# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Kona mín minti meg á, at sum forseti skal eg ansa væl eftir, hvat eg sigi, og eg má siga, at hon hevði rætt*
*George W. Bush*



*Russiska flogfarið millumlendi á flogvøllinum í Keflavík*
*Mynd: Morgunblaðið*

# Russiskt flogfar við landminum millumlendi í Íslandi

**Íslendsku myndugleikarnir vistu ikki, hvat var í flogfarinum, fyrr enn tað hevði sett seg**

Júst sum íslendingar og amerikanarar høvdu ta árligu verjuvenjingina Northern Wiking í september mánað, bað eitt russiskt flutningsflogfar um loyvi at millumlenda á altjóða flogvøllinum í Keflavík, tí brennievnið var farið at ganga undan.

Nú hevur Morgunblaðið fingið uppspurt, at tá tornið á flogvøllinum spurdi russiska flogskiparan, hvønn farm flogfarið hevði, var svarið frá flogskiparanum so mikið ógreitt, at eftirlitið á flogvøllinum spurdi umaftur og bað flogskiparan um nærri upplýsingar. Men tað fekk eftirlitið ikki. Kortini gjørdi leiðslan á flogvøllinum av at geva flogfarinum lendingarloyvið, so tað kundi fáa brennievni.

Íslendska eftirlitið skrásetti russiska flogfarið sum farmaflogfar, og tá eftirlitsmenn fóru umborð á flogfarið, komu teir eftir, at tað var fermt við 27 tonsum av ymsum hernaðarligum spreingievni.Millum annað fann eftirlitið landminur. Tær eru bannaðar í Íslandi, tí Ísland er eitt av londunum, sum hava skrivað undir altjóða landminubannið.

Tað kom óvart á íslendsku eftirlitsmennionar, at russiska flogfarið var fermt við hernaðarligum spreingievnum, tí flogfarið var ikki skrásett sum hernaðarflogfar. Tað hevði flogskiparin heldur ikki nevnt, tá hann bað um loyvi at lenda í Keflavík, skrivar Morgunblaðið.

Íslendska stjórnin bleiv kunnað um russiska flogfarið og farmin, men sambært keldunum hjá Morgunblaðnum vildu myndugleikarnir ikki steðga flogfarinum, sum tí fór aftur á flog við øllum farminum.



*Næstan 2.000 oyggjar eru í Maldivunum, og veðurlagsfrøðingar meta, at 1.000 teirra fara undir kav, áðrenn hendan øldin er runnin*
*Mynd: AFP*

## Maldivurnar fara undir innan 100 ár

**Nývaldi forsetin á Maldivunum ætlar at keypa jørð aðrastaðni, so fólkið kann flyta hagar, áðrenn oyggjarnar fara í kav**

Mohammed Nasheed, sum júst er valdur til forseta á Maldivunum, hevur stórar ætlanir, sum fáa ávirkan á hvørt mansbarn í landi hansara. Tær flestu oyggjarnar eru ikki meiri enn hálvan annan metur høgar, og forsetin stúrir fyri, at veðurlagsbroytingarnar fara at fáa havið at fløða so mikið, at landið fer undir innan 100 ár.

Ferðavinna er høvuðsinntøkukelda hjá Maldivunum, og forsetin ætlar nú at brúka pengarnar frá ferðavinnuni til at keypa jørð aðrastaðni, so oyggjafólkið hevur eitt stað at búseta seg í, tá tey noyðast at rýma undan havinum.

- Vit fara at gera íløgur í jørð í India, Sri Lanka ella kanska í Avstralia, sum er egnað til búseting. Vit ætla at vera fyrivarin, tí vit vilja ikki enda sum flóttafólk onkunstaðni, sigur Mohammed Nasheed, forseti við CNN.

Maldivurnar vórðu sera meint raktar av teirri stóru flóðalduni í Landssynningsasia á jólum í 2004. 69 oyggjar fóru undir, og 30 aðrar fóru næstan undir. Tað hevur verið upp á tal at gera brygingar rundan um høvuðsstaðin Male, men tað verður ov dýrt.

## Sprændu sýru í andlitið á skúlagentum



*Ein av teimum álopnu skúlagentunum*
*Mynd: BBC*

**Ókendir menn á motorsúklu sprændu sýru í andlitið á fleiri gentum, sum vóru á veg í skúla í afghanska býnum Kandahar**

Genturnar, sum vóru minst 15 í tali, vórðu álopnar beint uttan fyri gentuskúlan Mirwais Nika í miðbýnum í Kandahar. Illgerðarmenninir vóru á motorsúklu.

-Vit vóru á veg í skúla, tá tvey fólk á motorsúklu komu til okkara og tveittu sýru í andlitið á okkum, sigur ein av gentunum, tann 16 ára gamla Atifa Bibi, við bretska kringvarpið BBC. Hon heldur, at myndugleikarnir gera ov lítið fyri at verja gentur, sum ganga í skúla.

Tá Taliban sat við ræðið í Afghanistan, sluppu gentur ikki at ganga í skúla, og eygleiðarar í Kandahar halda, at tað vóru fólk, sum eru ímóti at geva gentum skúlagongd, sum skipaðu fyri álopinum.

## STUTT SAGT

### Stovna ikki gassfelag

Russiski forsætisráðharrin, Vladimir Putin, vísir aftur øllum gitingum um, at Russland er í ferð við at stovna ein gassfelagsskap eftir sama leisti sum oljufelagsskapurin OPEC.

Orsøkin til gitingarnar er, at Putin hevur ferðast dúgliga í seinastuni, og at hann hevur vitjað fleiri lond, sum framleiða og selja nógv gass. Eitt nú var hann í Iran og Qatar í gjár, og saman við Russlandi hava londini umleið ein triðing av øllum náttúrugassi í heiminum, skrivar NTB.

Russland, Iran og Qatar samdust í síðsta mánað um at samskipa orkupolitikkin hjá londunum, og tað elvdi til stúran í Evropa, sum hevur brúk fyri gassi úr Russlandi. Men Putin sissar evropearararnar og onnur.

- Tað er eingin orsøk til at stúra. Vit fara ikki at stovna nakað gassfelag, og vit gera ongar avtalur um prís, segði Putin, tá hann fyrrapartin í gjár hitti egyptiska forsætisráðharran, Ahmed Nazif.

### Funnu avgamla pyramidu

Egyptiskir fornfrøðingar hava funnið eina pyramidu, sum teir halda vera umleið 4.300 ára gamla, og sum sambært fyribilskanningum hevur verið gravstaður hjá einari drotning.

Sostatt eru 118 pyramidur funnar í Egyptalandi. Tann seinasta er funnin í landspartinum Saqqara, men fornfrøðingarnir siga, at har kann nógv annað liggja fjalt undir sandinum.

Fornfrøðingurin Zahi Hawass sigur við New York Times, at tað er altíð spennandi at finna eina pyramidu og at grava hana undan sandinum, men hann sigur, at tað er serliga spennandi, tá ein veit, at talan er um gravstað hjá eingum kongi ella einari drotning.

Í hesum førinum halda fornfrøðingarnir, at pyramidan hevur verið gravstaður hjá einari drotning. Teir halda, at talan helst er um drotningina Seshseshet, sum var mamma kongin Teti, ið var tann fyrsti kongurin í teirru sættu egyprisku kongsættini.